

TOYOTA AVENSIS 2,0 SOL L/B — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: NE 499 Km: 128.000
Árgangur: 01.05.01

Kr. 85.000,-



RENAULT SCENIC 1,6

Skrásetingarnr: RK 422 Km: 70.000
Árgangur: 26.04.01

Kr. 75.000,-



NISSAN ALMERA 1,8 SEDAN — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: SK 212 Km: 82.000
Árgangur: 01.04.03

Kr. 115.000,-



HONDA ACCORD 1,6

Skrásetingarnr: PT 777 Km: 114.000
Árgangur: 26.01.01

Kr. 78.000,-



SKODA FABIA 1,4

Skrásetingarnr: EL 476 Km: 90.000
Árgangur: 27.06.02

Kr. 65.000,-



NISSAN TERRANO 3,0 VØRUBILUR — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: KL 207 Km: 80.000
Árgangur: 25.06.03

Kr. 148.000,-



TOYOTA AVENSIS 1,8 SEDAN

Skrásetingarnr: MK 657 Km: 129.000
Árgangur: 20.01.99

Kr. 65.000,-



PEUGEOT 406 2,0 HDI — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: HV 532 Km: 183.000
Árgangur: 17.01.00

Kr. 98.000,-



FORD FOCUS TDI GHIA

Skrásetingarnr: HP 999 Km: 110.000
Árgangur: 07.12.00

Kr. 75.000,-



TOYOTA AVENSIS 2,2 D-CAT STW. 177 hk — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: HJ 563 Km: 59.000
Árgangur: 22.05.06

Kr. 295.000,-

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvìk • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F

Fyrivarni ver ur tikið fyri møguligum prentvillum.


# Statoil skift eigara

**Álítandi keldur, sum Sosialurin hevur tosað við, vátta, at Statoil hevur skift eigara: Løkir saman við Føroya Banka skulu vera nýggju eigararnir**


SØLA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*





*Sambært keldur, sum Sosialurin hevur tosað við, hevur Statoil fingið nýggjar eigarar*

Tað skuldi verið vist, og álítandi keldur hava eisini váttað tað fyri Sosialinum. Statoil hevur fingið nýggjar eigarar.

Sambært upplýsingum, sum Sosialurin hevur fingið hendur á, skulu nýggju eigararnir vera felagið Løkir og Føroya Banki. Men Petur Háberg Jacobsen, stjóri í Løkir vil ikki vátta hesi tíðindi. Hann sigur beinleiðis, at teir ikki hava verið í samráðingum um keyp av Statoil, og at teir heldur ikki hava keypt felagið.

Tað hevur í heila tikið verið trupult at fáa nakran alment at vátta søluna, tó at ávísar álítandi keldur óalment siga, at hon er farin fram.

Niels Juul Nattestad sigur seg heldur einki vita um nakra sølu, men hann sigur tó, at fyri rætta prísin er helst alt til sølu. Stjórin á Statoil vísir annars til leiðsluna í felagnum eysturi í Noregi.

Tað er jú ikki so langt síðani, at hitt oljufelagið skifti eigara, so út frá tí er ikki óhugsandi, at eisini Statoil hevur áhuga millum íleggjarar.

Forstjórin í Føroya Banka sat á fundi allan morgun, og tí fingu vit ikki orðið á Janus Petersen.

Men álítandi keldur, sum standa felagnum nær, vátta altso, at Statoil hevur skift eigara.

# Shefa 2 komin upp á pláss

**Kaðalskipið IT Intrepid er liðugt at leggja fjarskiftiskaðalin SHEFA 2, sum knýtir Føroyar í skotska meginlandið umvegis Hetland og Orknoyggjarnar**


SAMSKIFTI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*




Síðsti partur av kaðlinum, sum er teinurin ímillum Hetland og Orknoyggjarnar varð lagdur á land í Hetlandi í gjár. Kaðalin fer at tryggja Føroyum, Hetlandi og Orknoyggjunum trygt og munagott fjarskifti við útheimin í nógv ár frameftirm sigur Føroya Tele í tíðindaskrivi.

Síðsti teinurin av fjarskiftiskaðlinum, SHEFA 2, millum Føroyar og Skotland var lagdur í gjár, tá kaðalskipið, IT Intrepid, legði tann partin av kaðlinum, sum gongur millum Orknoyggjar og Hetland, á land í Hetlandi.

Kaðalskipið fór í juli undir at leggja SHEFA 2, sum knýtir Føroyar í skotska meginlandið umvegis Hetland og Orknoyggjar. Føroya Tele er í holt við at binda sjókaðalin í fjarskiftisnetini í øllum fýra londunum, og nýggja kaðalsambandið verður væntandi tikið í nýtslu fyrsta ársfjórðing 2008.

- Um samfeløg skulu fylgja við í altjóðagerðini, krevjast góðir og skjótir samskiftismøguleikar við útheimin. Tí er týdningarmikið fyri Føroya Tele at kunna veita tænastur við høgari dygd. Kundarnir krevja breiðband við høgari ferð og óavmarkaðari nýtslu, og krøvini til framtíðartænastur fara eisini at hava við sær tørv á hægri fjarskiftisorku, sigur Kristian Davidsen, samtaksstjóri í Føroya Tele.

Føroya Tele hevur lagt SHEFA 2, sum saman við FARICE fer at geva Føroyum trygt fjarskifti úteftir og at kalla óavmarkaða fjarskiftisorku mótvegis umheiminum. Nýggja sambandið fer at nøkta fjarskiftistørvin hjá føroyingum mótvegis umheiminum í nógv ár frameftir, eins og tað eisini lyftir fjarskiftissambandið hjá Hetlandi og Orknoyggjum við umheimin upp á eitt nógv hægri støði.

SHEFA 2 er ein fipurkaðal við sera nógvari fjarskiftisorku, og hetta er fyrstu ferð ein fipurkaðal verður lagdur millum Hetland, Orknoyggjarnar og Skotland. SHEFA 2 fer at geva Hetlandi og Orknoyggjunum skjótari og meira álítandi samband við umheimin.

SHEFA 2 er eisini ein fyritreyt fyri, at Føroya Tele kann víðka heimamarknaðin út um Føroyar. Fjarskiftiskaðalin, sum kostar 120 milliónir krónur, var lagdur á land á Hvítanesi fyri einum góðum mánaði síðani.